# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 23.01.2024 |
| Mál nr.: | 22/19215 |
| Málsviðgjørt: | JEK |
| Ummælistíð: | Frá 23.01-09.02.2024 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)**

(Gjaldfreist í sambandi við altjóða trætumálum, víðkað heimild at vitja peningastovnar í eftirlitshøpi o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 173 frá 21. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Tvær staðni í § 3, stk. 2, tvær staðni í § 3, stk. 3, § 3, stk. 5, § 29a, stk. 1, § 145, stk. 5, § 148 og § 157 a verður "Toll- og Skattaráð Føroya" broytt til: "TAKS".

**2.** Í § 51, stk. 6 og § 157 a verður "løgtingslóg um toll- og skattafyrisiting" broytt til: "løgtingslóg um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi"

**3.** Í § 62, stk. 2, § 67, stk. 2, § 100, stk. 2, tvær staðni í § 100, stk. 4, § 100, stk. 5, § 101, stk. 1, § 104, stk. 1, § 110, stk. 1, 3. pkt., § 110, stk. 4, § 120 e, stk. 2, § 125, stk. 1 og § 145, stk. 1 verður "Toll- og Skattaráðið" broytt til: "TAKS".

**4.** § 62, stk. 2, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Avgerðin hjá TAKS kann kærast til landsstýrismannin"

**5.** Í § 103, stk. 1, 2. pkt, § 103, stk. 2, 1. pkt., tvær staðni í § 118, stk. 7, § 118, stk. 8, § 119, stk. 1, 4. pkt. og § 125, stk. 4, 2. pkt. verður "Toll- og Skattaráðnum" broytt til: "TAKS".

**6.** Í § 118, stk. 1, litra b verður "frá Toll- og Skattaráðnum" broytt til: "sum

landsstýrismaðurin ásetir eftir tilmæli frá TAKS".

**7.** § 104, stk. 1, 2. pkt.verður strikað.

**8.** § 118 c, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Ultimativa móðurfelagið í einum fleirtjóða samtaki, sum er skattskyldugt í Føroyum, skal handa TAKS eina land fyri land frágreiðing fyri eitt inntøkuár, har samtakið hevur ein konsolideraðan umsetning á í minsta lagi 5,6 mia. kr. roknskaparárið frammanundan inntøkuárinum, sum tað skal fráboðast um."

**9.** § 118 d, stk. 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"1) Samtaksfelagið er skattskyldugt í Føroyum, og".

**10.** Aftan á § 118 g verður sum nýggj grein sett:

"**§ 118 h.** TAKS kann nokta feløgum o.ø. skráseting ella v-tal, um hesi í sambandi við stovnan ella skráseting ikki veita ella ikki hava veitt Skráseting Føroya ella TAKS fullfíggjaðar upplýsingar um veruligar eigarar. Feløg o.o., sum ikki hava veruligar eigarar, skulu ístaðin veita ella hava veitt fullfíggjaðar upplýsingar um stjórn, nevnd, leiklutir, ábyrgdir og viðtøkur.
*Stk. 2.* Feløg o.o. hava eftir umbøn skyldu til uttan óneyðugt drál at lata TAKS fullfíggjaðar upplýsingar um løgfrøðiligar eigarar, veruligar eigarar, stjórn, nevnd, leiklutir, ábyrgdir og viðtøkur. *Stk. 3.* Eru upplýsingar um veruligar eigarar, stjórn, nevnd, leiklutir, ábyrgdir og viðtøkur, veittar Skráseting Føroya ella TAKS, skeivar, ella broytast áður upplýst viðurskifti, hava feløg o.o., uttan at biðið verður um tað, skyldu til at skráseta fullfíggjaðar upplýsingar í virkisskránna ella eigaraskránna innan fýra vikur frá tí degi, at tey høvdu kunnleika um, at upplýsingarnar vóru ella eru vorðnar skeivar.
*Stk. 4.* Feløg o.o. hava ikki skyldu til at lata TAKS upplýsingar um broytingar sambært stk. 3, um hesi hava skyldu til at lata upplýsingarnar til Skráseting Føroya eftir aðrari løgtingslóg."

**11.** § 119, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Øll, annaðhvørt tey sambært løgtingslógini eru skyldug at føra roknskap ella ikki, hava skyldu til at leggja fyri líkningarvaldið roknskapartilfar sítt við fylgjskjølum, bæði fyri eldri og inniverandi ár, tá hetta verður kravt, og annars øll skjøl, sum kunnu vera til sannan av álíkningini".

**12.** § 119, stk. 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Øll, annaðhvørt tey sambært løgtingslógini hava roknskaparskyldu ella ikki, hava skyldu til at lata líkningarvaldið ella persón, sum líkningarvaldið tilnevnir, sleppa á staðið at eftirkanna roknskapartilfarið og øll skjøl, sum kunnu vera av týdningi fyri rættleikan av álíkningini."

**13.** § 120 q, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Líkningarvaldið ella tann persónur, sum líkningarvaldið tilnevnir hevur rætt til at koma á staðið til tess at tryggja hóskandi nærlagni og at tryggja, at rættar fráboðanarmannagongdir verða nýttar. Persónur ella felag o.o., sum forðar líkningarvaldinum ella tilnevndum persóni at koma á staðið kann revsast við sekt. Líkningarvaldið kann um neyðugt biðja løgregluna hjálpa sær at fremja sínar uppgávur eftir hesum stykki."
Stk. 3-6 verða eftir hetta stk. 4-7.

**14.** § 138, stk. 1 verður orðað soleiðis:

“ Eingin skattgjaldari kann koma sær undan skyldu síni at rinda tann skatt, ið longu er fallin til gjaldingar, hvørki við at leggja málið fyri málsráðandi myndugleikan í einum av ríkjunum, sum er partur av viðkomandi sáttmála, við at kæra um skattsetingina ella, um hann verður pantaður fyri skattin, við at mótmæla hjá pantifútanum, uttan so at vald, ið hevur heimild til tess, fyrst hevur gjørt av, at broyting eigur at verða gjørd, ella at skattsetingin er gjørd av órættum ella er ógild.

**15.** § 139 c verða sum aftan nr. 3 sum nýggj nr. sett:
”4) Letur vera við at veita skattamyndugleikunum upplýsingar sambært § 120 q, ella kunngerð við heimild í § 120 q, til tíðina.
5) Gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar, tá upplýsingar verða latnar sambært § 120 q ella kunngerð við heimild í § 120 q.”

**16.** Í § 146, stk. 2 verður “Toll- og Skattaráðsins” broytt: “frá TAKS”.

**17.** Í § 150 verður 1. pkt. orðað soleiðis: “Er eitt av teimum í hesum kapitli umrøddu lógarbrotum framt av einum løgfrøðiligum persóni, kann hesum verða álagt sektarábyrgd.”

**18.** § 157 a verður orðað soleiðis: “Landsstýrismaðurin kann geva TAKS, sum er skipað við løgtingslóg um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi, heimild til at taka avgerðir eftir hesi løgtingslóg.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Við uppskotinum verður mælt til at gera ymiskar broytingar í skattalógini.

Fleiri av tilmæltu broytingunum hava samband við altjóða skattaviðurskifti.

Føroyar blivu í 2017 limur í Global Forum og í 2019 blivu Føroyar limur í IF BEPS (Inclusive Framework on Base Erosion and Profit Shifting).

Global Forum arbeiðir við umbýti av skattaupplýsingum, bæði eftir áheitan og sjálvvirkandi, og fyri størri gjøgnumskygni. IF BEPS arbeiðir m.a. við eini ætlan um at broyta tillutanina av skatti hjá heimsins størstu samtøkum frá landinum, har samtakið hevur sín heimstað til londini, har samtakið hevur sínar marknaðir. Somuleiðis verður arbeitt við at fáa innført ein globalan minimumsskatt á 15%.

Sum limur í hesum skattatorgum (fora) verða bæði okkara lóggáva og okkara tøkniligu skipanir, almennar og privatar, eftirmettar av javnlíkum uttanífrá í sambandi við sonevnd peer review.

Broytingarnar kunnu býtast sundur í trý:

- Sambært galdandi skattalóg er bert heimild til at veita gjaldfreist í sambandi við kærumál. Sostatt er ikki heimild til at veita gjaldfreist í sambandi við sínámillum avtalur í tvískattamálum, sonevndum MAP-málum (Mutual Agreement Procedures), hóast hesi mál kunnu gerast sera drúgv.

  Ein skipan við gjaldfreist ber í sær ein gjaldskáa í mun til ta freist, sum annars hevði verið galdandi. Ein áheitan um gjaldfreist er grundað á, at skattagjaldarin og skattamyndugleikin hava hvør sína fatan av, hvør rætta niðurstøðan eigur at vera í málinum.

  Tá gjaldfreist verður játtað, verður skattakravið renturoknað sambært galdandi reglum. Játtanin um gjaldfreist kann harumframt verða treytað av, at skattgjaldarin veitir peningatrygd fyri skattakravinum.

- Sambært galdandi lóggávu hevur TAKS ikki heimild til at fara á vitjanir hjá peningastovnunum til tess at tryggja hóskandi nærlagni (due diligence) og at tryggja at rættar fráboðanarmannagondir verða nýttar í sambandi við altjóða umbýti av skattauppslýsingum.

- Loksins er tørvur á at neyvlýsa ásetingar í skattalógini og í ávísum førum at víðka ásetingar bæði evnisliga og formliga.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært galdandi lóggávu hevur TAKS bert heimild til at veita gjaldfreist í sambandi við kærumál.

Galdandi lóggávu heimilar ikki, at TAKS fer á vitjanir hjá peningastovnunum til tess at tryggja hóskandi nærlagni (due diligence) og at tryggja, at rættar fráboðanarmannagondir verða nýttar í sambandi við altjóða umbýti av skattauppslýsingum.

Eftir at Føroyar blivu limur í Global Forum og IF BEPS (Inclusive Framework on Base Erosion and Profit Shifting) hevur tað víst seg, at tørvur er á at nágreina ávísar ásetingar í galdandi lóggávu, sum ikki verða mettar at vera nóg neyvar.

Endiliga hevur galdandi lóggávu tilvísingar til gomul stovnsheitir og avtikin ráð.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Føroyar hava við sínum limaskapi í Global Forum og IF BEPS, tveir altjóða skattaapallar, bundið seg til at tryggja gjøgnumskygni og trygt umbýti av skattaupplýsingum ávikavist at uppstiga galdandi tvískattasáttmálar og galdandi skattalóggávu, soleiðis at hesi eru í samsvari við avtalurnar handan Global Forum og IF BEPS. Umframt Global Forum og IF BEPS hava Føroyar mótvegis ES bundið seg til at tryggja, at landið heldur sínar altjóða skyldur á skattaøkinum.

Høvuðsendamálið við uppskotinum er sostatt at tryggja, at Føroyar halda sínar altjóða skyldur.

Umframt áðurnevnda endamál er tørvur á at dagføra stovnsheitir og heimildir sum avleiðing av løgtingslóg um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður skattalógin dagførd til tess at tryggja TAKS heimild til at veita gjaldfreist í MAP-málum. Við uppskotinum verður TAKS harnæst heimilað at fara á vitjanir hjá peningastovnunum við atliti at hóskandi nærlagni og til tess at tryggja, at rættar fráboðanarmannagondir verða nýttar við atliti at altjóða umbýti av skattaupplýsingum. Loksins verður skattalógin dagførd sum avleiðing av, at Toll- og Skattaráð Føroya er tikið av við løgtingslóg um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi og heimildir ráðsins í stóran mun eru fluttar til TAKS.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Felagnum Føroyskir Peningastovnar, TAKS og Vinnuhúsinum.

Uppskotið hevur harumframt verið til almenna hoyring á hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur orsakað av broyttu reglunum um gjaldfreist.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur jaligar umsitingarliga avleiðingar fyri TAKS í sambandi við komandi sonevnd peer reviews, har lóggáva og tøkniligar skipanir bæði hjá almennum myndugleikum og privatum fyritøkum verða eftirmettar av javnlíkum uttanífrá.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið hevur jaligar avleiðingar í mun til millumtjóðasáttmálar á økinum.

Føroyar hava umvegis sín limaskap í Global Forum og IF BEPS (Inclusiv Framework on Base Erosion and Profit Shifting) bundið seg til at tryggja gjøgnumskygni og trygt umbýti av skattaupplýsingum ávikavist at uppstiga galdandi tvískattasáttmálar og skattalóggávuna, soleiðis at hesi eru í samsvari við avtalurnar handan Global Forum og IF BEPS. Umframt Global Forum og IF BEPS hava Føroyar mótvegis ES (the Code of Conduct Group) bundið seg til at tryggja, at landið heldur sínar altjóða skyldur á skattaøkinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**

   Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**

   Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Evropeiska mannarættindasáttmálan.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

### 2.9. Markaforðingar

Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Við lógaruppskotinum verða tvær nýggjar revsiásetingar settar inn í § 139 c í skattalógini, sum snúgva seg um brot á upplýsingarskylduna í § 120 q ávíkavist kunngerð við heimild í § 120 q við antin ikki at lata skattamyndugleikanum lógarkravdar upplýsingar til tíðina, ella við at geva skattamyndugleikanum skeivar ella villleiðandi upplýsingar. § 120 q í skattalógini snýr seg um upplýsingar, sum fíggjarstovnar á hvørjum ári hava skyldu til at lata TAKS uttan at biðið verður um tað.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Talan er um eitt skattauppskot.

### 2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Lógaruppskotið áleggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**
**Til § 1,**
**Nr. 1**
Toll- og Skattaráð Føroya er tikið av við løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi. Sum ein avleiðing av hesum verða heimildir ráðsins fluttar til TAKS.

**Nr. 2**
Við løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi varð løgtingslóg um toll- og skattafyrisiting sett úr gildi og fyrstnevnda løgtingslóg kom í staðin fyri. Broytingin er at síggja sum ein avleiðing av hesi sannroynd.

**Nr. 3**
Toll- og Skattaráð Føroya er tikið av við løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi. Sum ein avleiðing av hesum verða heimildir ráðsins fluttar til TAKS.

**Nr. 4**
Toll- og Skattaráð Føroya er tikið av við løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi, og heimildir ráðsins sambært § 62, stk. 2 í skattalógini eru fluttar til TAKS. Broytingin er at síggja sum ein avleiðing av hesum.

**Nr. 5**
Toll- og Skattaráð Føroya er tikið av við løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi, og heimildir ráðsins eru í stóran mun fluttar til TAKS. Broytingin er at síggja sum ein avleiðing av hesum.

**Nr. 6**
Toll- og Skattaráð Føroya er tikið av við løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi. Framyvir verður tað landsstýrismaðurin sum ásetir virðið á fríum ágóðum eftir tilmæli frá TAKS.

**Nr. 7**
Eftir at Toll- og Skattaráð Føroya er tikið av við løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022, og eftir at TAKS hevur yvirtikið uppgávur ráðsins, er ikki tørvur á heimildini at fyriseta neyvari reglur.

**Nr. 8**
Við broytingini verða tilvísingarnar til § 1 í skattalógini og § 1 í kapitalvinningsskattalógini strikaðar, eftirsum hesar tilvísingar avmarka skylduna at lata inn frágreiðing til fult skattskyldug feløg. Við øðrum orðum sleppa avmarkað skattskyldug feløg við verandi orðing undan at lata inn frágreiðing, eisini tá móðurfelagið ikki hevur skyldu at lata inn frágreiðing í landinum, har móðurfelagið skattliga hoyrir heima.

**Nr. 9**
Í mun til galdandi áseting verður § 1 í skattalógini strikað, eftirsum henda tilvísing avmarkar skylduna at lata inn frágreiðing til fult skattskyldug feløg. Við øðrum orðum sleppa avmarkað skattskyldug feløg undan at lata inn frágreiðing, eisini tá móðurfelagið ikki hevur skyldu at lata inn frágreiðing í landinum, har móðurfelagið skattliga hoyrir heima.

**Nr. 10**
**Stk. 1**
Sum feløg o.o. er at skilja allar løgfrøðiligar eindir og skipanir, undir hesum t.d. grunnar og trustar.

Ásetingin hevur til endamáls at tryggja, at løgfrøðiligar eindir og skipanir ikki fáa tillutað v tal uttan at føroyskir myndugleikar fáa upplýsingar um, hvør veruliga eigur hesar eindir ella skipanir. Atlitini eru tey somu, sum galda fyri skyldur í føroyskari lóggávu um at fráboða upplýsingar um veruligar eigarar til Skráseting Føroya og fíggjarstovnar, undir hesum eisini í mun til hvítvask av vinningi, fígging av yvirgangi og skattligt gjøgnumskygni. Flestar eindir og skipanir hava longu sum nú er skyldu til at veita Skráseting Føroya upplýsingar um veruligar eigarar, og vil ásetingin tí í stóran mun einans hava týdning fyri skipanir og eindir, sum ikki hava hesa skyldu ella sum veita Skráseting Føroya ófullfíggjaðar upplýsingar um veruligar eigarar.

Hugtakið veruligur eigari skal vanliga skiljast eins og lýst í føroyskari lóggávu, undir hesum t.d. løgtingslóg um parta- og smápartafeløg, lov om visse erhvervsdrivende virksomheder, lov om erhvervsdrivende fonde, og hvítvasklóggávuni. Er talan um løgfrøðiliga eind ella skipan, hvørs veruligu eigarar føroysk lóggáva ikki hevur lýst, skal hugtakið veruligur eigari sum meginregla skiljast eins og lýst í FATF tilmæli 24 og 25 og vegleiðingunum til hetta. Hetta fyri at eingin løgfrøðilig eind ella skipan skal fella uttanfyri hetta stykkið.

Upplýsing um at eingin veruligur eigari er kann eftir umstøðunum verða at rokna sum upplýsing um veruligar eigarar, t.e., um tað veruliga eingin veruligur eigari er. Tá eingin veruligur eigari er, skulu feløg o.o. í staðin lata upplýsingar um stjórn, leiklutir, ábyrgdir og viðtøkur, soleiðis at m.a. leiðslustrukturin gerst greiður fyri TAKS.

Einans í undantaksføri og við nøktandi grundgeving frá løgfrøðiligari eind ella skipan kann TAKS skráseta ella tilluta løgfrøðiligari eind ella skipan v tal, um eindin ella skipanin sigur seg ikki vita, hvør teir veruligu eigararnir eru, ella um veruligir eigarar yvirhøvur eru. Verður tílík løgfrøðilig eind ella skipan skrásett, verða veittar upplýsingar sum meginregla at rokna sum skeivar, og hevur eindin ella skipanin skyldu at veita fullfíggjaðar upplýsingar sambært stk. 3, tá hendan gerst varug við veruligar eigarar. Tað eigur ikki at koma fyri, at føroyskar eindir ella skipanir undir stovnan – ella sum eru nýliga stovnaðar – ikki hava upplýsingar um veruligar eigarar at veita.

Hevur løgfrøðilig eind ella skipan, ið TAKS hevur skrásett ella tillutað eitt v-tal, í sambandi við stovnan ella skráseting, veitt Skráseting Føroya ella TAKS ófullfíggjaðar, undir hesum skeivar upplýsingar um veruligar eigarar, hevur eindin ella skipanin ikki veitt fullfíggjaðar upplýsingar, og eru treytirnar fyri skráseting og tillutan av v-tali tískil ikki loknar.

Heimildin hjá TAKS at nokta tillutan av v-tali er galdandi, óansæð hvør myndugleiki annars hevur ella fær til uppgávu at tilluta v-tøl. Noktar TAKS skráseting ella tillutan av v-tali, ávirkar tað ikki skyldurnar hjá viðkomandi løgfrøðiliga eind ella skipan sambært skatta- og avgjaldslóggávuna annars, t.d. um hendan rekur skatt- ella avgjaldsskyldugt virksemi.

**Stk.2.**
Ásetingin hevur til endamáls at veita TAKS heimild til at krevja, at løgfrøðiligar eindir og skipanir eftir umbøn skulu veita TAKS fullfíggjaðar upplýsingar um løgfrøðiligar eigarar, veruligar eigarar, ella stjórn, leiklutir, ábyrgdir og viðtøkur.

Manglandi lýdni við umbøn frá TAKS kann revsast sambært § 141, stk. 1, nr. 3 í skattalógini, og eiga álagdar sektir at vera nóg stórar til, at tað ikki loysir seg ikki at veita umbidnar upplýsingar.

**Stk. 3.**
Ásetingin hevur til endamáls at tryggja, at løgfrøðiligar eindir ella skipanir hava skyldu til at veita føroyskum skrásetingarmyndugleikum dagførdar og fullfíggjaðar upplýsingar, um áður latnar upplýsingar ikki vóru ella ikki longur eru fullfíggjaðar. Upplýsingarnar skulu skrásetast í virkisskránna ella eigaraskránna, í tann mun hesar loyva skráseting.

Brot á hesa skyldu kann revsast sambært § 141, stk. 1, nr. 3 í skattalógini.

**Stk. 4.**
Ásetingin í stk. 3. hevur ikki til endamáls at skúgva til viks galdandi fráboðanarskyldur, undir hesum serliga í partafelagslóggávuni, og verður tí ásett í stk. 4, at skyldan at lata upplýsingar sambært stk. 3 ikki er galdandi, um feløg o.o. hava skyldu til at lata viðkomandi upplýsingar til Skráseting Føroya eftir aðrari løgtingslóg. Ásetingin í stk. 3 er sostatt subsidiær í mun til galdandi ásetingar, sum regulera somu viðurskifti.

**Nr. 11**
Global Forum hevur í sambandi við Exchange of Information on Request peer reivew´ið av Føroyum gjørt vart við, at heimildin í § 119, stk. 1 í skattalógini er avmarkað til skattasubjekt, sum reka vinnu. Tað er tí ivasamt, hvørt galdandi áseting er nøktandi, og um ásetingin heimilar persóni at nokta TAKS roknskapartilfar og skjøl vísandi til, at viðkomandi ikki er vinnurekandi.

Hóast verandi áseting higartil ikki hevur givið TAKS trupulleikar, verður tað mett rættast at binda um heilan fingur og strika ", sum reka vinnu," í § 119, stk. 1, 1. pkt. í skattalógini, so einki ivamál er um heimildina.

**Nr. 12**
Global Forum hevur í sambandi við Exchange of Information on Request peer review´ið av Føroyum gjørt vart við, at heimildin í § 119, stk. 2 í skattalógini er avmarkað til skattasubjekt, sum reka vinnu. Tað er tí ivasamt, hvørt galdandi áseting er nøktandi, og um ásetingin heimilar persóni at nokta TAKS roknskapartilfar og skjøl vísandi til, at viðkomandi ikki er vinnurekandi.

Hóast ásetingin ikki higartil hevur givið TAKS trupulleikar, verður tað mett rættast at binda um heilan fingur og strika ", sum reka vinnu," í § 119, stk. 2, 1. pkt., so einki ivamál er um heimildina.

**Nr. 13**
Føroyar eru í sambandi við Automatic Exchange of Information peer review´ið gjørdar varugar við, at skattalóggávan eigur at heimila TAKS ella persóni, sum TAKS tilnevnir, rætt til at koma á staðið til tess at tryggja hóskandi nærlagni og at tryggja, at rættar fráboðanarmannagongdir verða nýttar.

Við uppskotinum verða hesar heimildir fingnar til vega, og tað verður harumframt ásett, at persónur ella felag o.o., sum forðar TAKS ella tilnevndum persóni at koma á staðið kann revsast við sekt.

Loksins verður ásett, at TAKS um neyðugt kann biðja løgregluna hjálpa sær at fremja sínar uppgávur.

**Nr. 14**
Sambært galdandi lóggávu hevur TAKS bert heimild til at veita gjaldfreist í sambandi við kærumál. TAKS hevur hinvegin ikki heimild til at veita gjaldfreist í sambandi við sínámillum avtalur í tvískattamálum, sonevndum MAP-málum.

Skipanin við gjaldfreist ber í sær ein gjaldskáa í mun til ta freist, sum annars hevði verið galdandi. Ein áheitan um gjaldfreist er grundað á, at skattagjaldarin og TAKS hava hvør sína fatan av, hvør rætta niðurstøðan eigur at vera í málinum.

Um gjaldfreist verður játtað, verður skattakravið renturoknað sambært galdandi reglum. Játtanin um gjaldfreist kann harumframt verða treytað av, at skattgjaldarin veitir peningatrygd fyri skattakravinum.

**Nr. 15**
Í sambandi við annað umfar av Automatic Exchange of Information peer review´num hevur Global Forum gjørt vart við, at skattalógin ikki inniheldur greiðar revsireglur, tá fíggjarstovnar lata TAKS skeivar ella villleiðandi upplýsingar, sbrt. § 120 q í skattalógini ella kunngerð við heimild í § 120 q. § 120 q í skattalógini snýr seg um fíggjarkontur, sum fíggjarstovnar á hvørjum ári hava skyldu til at TAKS uttan at biðið verður um tað.

Við broytingini verður nevndu heimildir fignar til vega.

**Nr. 16**
Toll- og Skattaráð Føroya er tikið av við løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi. Sum ein avleiðing av hesum verða heimildir ráðsins fluttar til TAKS.

**Nr. 17.**
Við broytingini verður ásetingin víðkað, soleiðis at hon framyvir fevnir um allar løgfrøðiligar eindir og skipanir.

**Nr. 18**
Toll- og Skattaráð Føroya er tikið av við løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi. Sum ein avleiðing av hesum verður ásetingin umorðað.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 23. januar 2024

**Ruth Vang**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: